| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 25. februar 2016 |
| Býráðsfundur nr. | 02/2016 |
| Borgarstjóri | Sonni á Horni |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2016 tann 25. februar kl. 17.00 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 18. februar 2016 um innkalling til fundar.

**Møtt vórðu:**

Sonni á Horni
Magnus S. Midjord
Sigga Óladóttir Joensen
Sigurð S. Simonsen
Dánjal Vang
Petur Abrahamsen
Eyðun á Lakjuni
Birgir Petersen
Asbjørn Berthelsen

Asbjørn Berthelsen møtti sum varalimur fyri Árant Berjastein á lista D, sum hevði boðað frá forfalli til fundin.

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

**Mál nr. 13/2016.**

**Mál viðvíkjandi 2. viðgerð av eykajáttan til íløgur í Fuglafjarðar Havn.**

Í samband við íløgur í Fuglafjarðar havn hevur teknisk deild gjørt kostnaðarmeting fyri arbeiði, ið ætlanin eru at fremja í 2016, og sum ikki eru tikin við í góðkendu fíggjarætlanini fyri 2016. Partar av hesum varð fígging til í 2015, men vórðu íløgurnar ikki eru yvirførdar við neyðugari fígging frá 2015, tá ið figgjarætlanin fyri ár 2016 var gjørd og endaliga samtykt.

*Kostnaðarmeting frá teknisku deild til írestandi fígging 2016 verður lýst niðanfyri:*

**Øki til Vónina á Enni:**

| | |
|---|---|
| Dekkgrót | kr. 1.100.000,- |
| Planering, kloakkir vatnleiðing | kr. 400.000,- |
| Spreingiarbeiði: umleið 6 – 7 m niðan | kr. 1.100.000,- |
| **Samanlagt til øki á Enni** | **kr. 2.600.000,-** |

**Øki til silobararí hjá Havsbrún:**

| | |
|---|---|
| Dekkgrót | kr. 150.000,- |

**Frystikaj III**:

| | |
|---|---|
| Fellur til gjaldingar í 2016 sam. | |
| Sáttmála við J & k Petersen | kr. 4.500.000,- |
| Endaveggur heimeftir írestandi fígging | kr. 3.000.000,- |
| **Samanlagt** | **kr. 7.500.000,-** |

Samanlagt **kr. 10.250.000,-**

Vinnunevndin hevur viðgjørt málið á fundi 19. januar 2016, og mælir nevndin fíggjarnevndini/býráðnum til, at íløgurnar verða fíggjaðar við eini eykaajáttan fyri ár 2016.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini tann 20. januar 2016, og mælir nevndin býráðnum til at veita eina eykajáttan upp á kr. 4,5 mió. til írestandi sáttmálaarbeiði hjá P/F J & K Petersen, hetta sambært undirskrivaða sáttmálan partanna millum, dagfestur 21. september 2015.

Talan verður sostatt um eina eykajáttan til rakstrarstað 751 Íløgur í Fuglafjarðar havn konto 3142-00, sum hækkað verður við nevndu kr. 4,5 mió upp á kr. 15.140.000,00. Avsettar eru kr. 10.640.000,00 á fíggjarætlanini fyri 2016, har kr. 7,1 mió skulu verða nýttar til keyp av gróti frá Havsbrún sambært skrivligari avtalu, kr. 2,0 mió til bátahylin, kr. 1,0 mió til frystibryggjuna og kr. 640.000,00 til aðara íløgur eitt nú stuðlamúr við Vónina. Staðfest er sosatt, at eingin framflyting er gjørd av ónýttum játtanum fyri 2015 til 2016.

Staðfest er, at kommunan hevur goldið felagnum kr. 2.056.000,00 fyri arbeiðið, ið gjørt er í 2015, so sambært fyriliggjan resta sostatt kr. 4,5 mió í til gjald til felagið fyri 2016.

Fyribils tøl fyri 2015 vísa, at nýttar eru kr. 16.674.468,01 móti eini játtaðari avseting upp á kr. 21.100.000,00 í fíggjarætlanini. Sosatt er minninýtslan kr. 4.425.631,59.

Fíggingin av eykajáttanini verður fingin til vega frá § 25 Gjaldføri (innistandandi peningi), sum flutt verður frá 2015 til 2016.

Nevndin samtykti somuleiðis at heita á Vinnunevndina um at koma við eini nærri útgreining av øðrum eykajáttanum, sum nevndin hevur heitt á fíggjarnevndina um fígging til.

Ein eykajáttan sum henda førir eina útreiðslu við sær, sum hevur beinleiðis ávirkkan á roknskap kommununar fyri 2016.

Tá ið talan er um eina eykajáttan, skal málið hava 2 viðgerðir í býráðnum við í minsta lagi 14 daga millumbili, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri við seinni broytingum, og við hvørja eykajáttan skal verðá víst á, hvussu hon skal verða fíggjað.

Í hesum máli, eins og í øðrum verður víst til § 31, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri við broytingum um nevndarformenn, at hesir ansa eftir, at allar inntøkur og útreiðslur hava neyðuga játtan.

Málið hevur verið til viðgerðar á býráðsfundi 28. januar 2016 og varð samtykt at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini og beina málið til 2. og endaliga viðgerð á býráðsfundinum 25. februar 2016. 8 atkvøður fyri og 1 atkvøða ímóti. Fyri atkvøddu Sonni á Horni, Magnus S. Midjord, , Sigurð S. Simonsen, Eyðun á Lakjuni, Birgir Petersen, Dánjal Vang, Petur Abrahamsen og Asbjørn Berthelsen. Ímóti atkvøddi Sigga Óladóttir Joensen.

**Avgerð:**
Samtykt varð við 2. viðgerð at góðkenna eykajáttan til íløgur í Fuglafjarðar havn rakstrarstað 751, konta 3142-00 upp á kr. 4,5 mió., og at henda verður fíggjað sambært § 25 gjaldføri (innistandandi peningi), sum flutt verður frá 2016 til 2016. (9-0).

**Mál nr. 14/2016.**

**Mál viðvíkjandi 1. viðgerð av eykajáttan til íløgur í Fuglafjarðar Havn.**

Í samband við íløgur í Fuglafjarðar havn hevur teknisk deild gjørt kostnaðarmeting fyri arbeiði, ið ætlanin eru at fremja í 2016, og sum ikki eru tikin við í góðkendu fíggjarætlanini fyri 2016. Partar av hesum varð fígging til í 2015, men vóru íløgurnar ikki eru yvirførdar við neyðugari fígging frá 2015, tá ið figgjarætlanin fyri ár 2016 var gjørd og endaliga samtykt.

*Kostnaðarmeting frá teknisku deild til írestandi fígging 2016 verður lýst niðanfyri:*

**Øki til Vónina á Enni:**

| | |
|---|---|
| Dekkgrót | kr. 1.100.000,- |
| Planering, kloakkir vatnleiðing | kr. 400.000,- |
| Spreingiarbeiði: umleið 6 – 7 m niðan | kr. 1.100.000,- |
| **Samanlagt til øki á Enni** | **kr. 2.600.000,-** |

**Øki til silobararí hjá Havsbrún:**

| | |
|---|---|
| Dekkgrót | kr. 150.000,- |

**Frystikaj III**:

| | |
|---|---|
| Fellur til gjaldingar í 2016 sam. | |
| Sáttmála við J & k Petersen | kr. 4.500.000,- |
| Endaveggur heimeftir írestandi fígging | kr. 3.000.000,- |
| **Samanlagt** | **kr. 7.500.000,-** |

Samanlagt kr. 10.250.000,-

Vinnunevndin hevur viðgjørt málið á fundi 19. januar 2016, og mælir nevndin fíggjarnevndini/býráðnum til, at íløgurnar verða fíggjaðar við eini eykaajáttan fyri ár 2016.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini tann 20. januar 2016, og mælir nevndin býráðnum til at veita eina eykajáttan upp á kr. 4,5 mió. til írestandi sáttmálaarbeiði hjá P/F J & K Petersen, hetta sambært undirskrivaða sáttmálan partanna millum, dagfestur 21. september 2015.

Talan verður sostatt um eina eykajáttan til rakstrarstað 751 Íløgur í Fuglafjarðar havn konto 3142-00, sum hækkað verður við nevndu kr. 4,5 mió upp á kr. 15.140.000,00. Avsettar eru kr. 10.640.000,00 á fíggjarætlanini fyri 2016, har kr. 7,1 mió skulu verða nýttar til keyp av gróti frá Havsbrún sambært skrivligari avtalu, kr. 2,0 mió til bátahylin, kr. 1,0 mió til frystibryggjuna og kr. 640.000,00 til aðara íløgur eitt nú stuðlamúr við Vónina. Staðfest er sosattt, at eingin framflyting er gjørd av ónýttum játtanum fyri 2015 til 2016.

Staðfest er eisini, at kommunan hevur goldið felagnum kr. 2.056.000,00 fyri arbeiðið, ið gjørt er í 2015, so sambært fyriliggjan resta sostatt kr. 4,5 mió í til gjald til felagið fyri 2016.

Fyribils tøl fyri 2015 vísa, at nýttar eru kr. 16.674.468,01 móti eini játtaðari avseting upp á kr. 21.100.000,00 í fíggjarætlanini. Sosatt er minninýtslan kr. 4.425.631,59.

Fíggingin av eykajáttanini verður fingin til vega frá § 25 Gjaldføri (innistandandi peningi), sum flutt verður frá 2015 til 2016.

Málið um eykajáttanina upp á kr. 4,5 mió til frystibryggjuna hevur verið til 1. viðgerð á býráðsfundi 28. januar 2016 og varð avgerð tikin um at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini og beina málið til 2. og endaliga viðgerð á býráðsfundinum 25. februar 2016.

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundinum 20. januar 2016 eisini málini um eykajáttanina til øki til Vónina upp á kr. 2,6 mió. og frystibryggjuna upp á kr. 3,0 mió. ella tilsamans kr. 5.6. Nevndin tók ikki støðu til hesar eykajáttanir á fundinium, við tað at nevndin vildi hava eina nærri útgreining av:

A. Økinum hjá Vónini, har avsettar og nýttar eru kr. 3,0 mió í 2015, sum er tann játtan, sum samtykt varð í fíggjarætlan kommununar til hetta endamál sambært meting, og hví henda upphædd nú er hækkað við kr. 2,6 mió upp í kr. 5,6 mió.

B. Eina nærri útgreining av endavegginum heimeftir, har írestandi fígging er kr. 3,0 mió. Spurningurin er, um hetta er samsvarandi tí tilmæli, sum vinnunevndin lat fíggjarnevndini í sambandi við fíggjarætlanarynski fyri 2016.

Somuleiðis ynskti nevndin at fáa eina frágreiðing um, hvørjar upphæddir fyri keyp av gróti skulu verða sendar frá havnini til aðrar íløgur í onnur rakstrarøki/rakstrarstøð. Talan er um eitt nú grót til gongugøtuna Kambsdalur/Fuglafjørður, útstykkingar vm.

Nevndin varð samd um, at fáa neyðugar upplýsningar til vega beinanvegin, og at málið verður viðgjørt á fyrst komandi nevndarfundi.

Vinnunevndin hevur viðgjørt málið á fundi 12. februar 2016 og samtykti at senda fyriliggjandi uppgerð frá teknisku deildini, dagfest 11. februar 2016 til fíggjarnevndina.

Sambært hesi uppgerð verður talan um eina samlaðan eykajáttanartørv til íløgur í Fuglafjarðar havn – tó ikki til bátahavnina – upp á kr. 9.450.000,00, sum útgreinaður er í yvirlitinum, og tá er eykajáttanin við 1. viðgerð upp á kr. 4,5 mió til frystibryggjuna tikin við.

Sostatt er talan um eina íløgu eftir 1. viðgerð í býráðnum 28. januar 2015 upp á kr. 5,0 mió.

*Útgreiningin er henda:*

| | **Íløgutekstur:** | **Upphædd kr.:** |
|---|---|---|
| 1 | Økið til Vónina á Enninum | 2.600.000,00 |
| 2 | Frystibryggja endaveggur | 2.200.000,00 |
| 3 | Frystibryggja leingjan játtan 1. viðgerð | 0,00 |
| 4 | Dekkgrót Silobattarí | 200.000,00 |
| 1-4 | Eykajáttanir tils. - 3 | 5.000.000,00 |

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini tann 17. februar 2016 og mælir nevndin býráðnum til at veita eina eykajáttan upp á kr. 2,8 mió kr. til íløgur í Fuglafjarðar havn 1 og 4, meðan metir, at játtanin til endaveggin á frystibryggjuni verður tikin við í játtan á fíggjarætlan kommununar fyri 2017.
Kommunan skal taka upp samráðingar við P/F J & K Petersen beinanvegin um at útseta gjaldið fyri arbeiðið við endavegginum á frystibryggjuni til 2017.

Eykajáttanin upp á kr. 2,8 mió verður veitt til íløgur í Fuglafjarðar havn, rakstrarstað 751, konto 3141-00, soleiðis at samlaða játtanin til Fuglafjarðar havn, tó ikki til bátahavnina, verður hækkað úr kr. 10,640 mió. upp í kr. 17.9. Útgreingin av eykajáttanum kr. 2,8 til 1. viðgerð og kr. 4,5, sum játtaðar eru við 1. viðgerð 28. januar 2016 og sum skulu til 2. viðgerð 25. februar 2016.

Um eykajáttanin til bátahavnina verður tikin við upp á kr. 2,8 mió, so verður samlaðu eykajáttanirnar kr. 10,1 mió og samlaða játtanin til íløgur í Fuglafjarðar havn rakstrarstað 751, konta 3141, tilsamans kr. 20,74 mió.

Víst verður til § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri við seinni broytingum.

Víst verður í hesum sambandi til yvirlit, sum fyrisitingin hevur latið fíggjarnevndini tann 16. mars 2016 og rættingar eftir fundin í fíggjarnevndini 17. februar 2016.

Vísandi til § 41, stk. 2 í omanfyri nevndu lóg verður eykajáttanin upp á kr. 2,8 mió fíggjað sambært niðanfyri standandi:

| | **Játtanartekstur:** | **Upphædd kr.:** |
|---|---|---|
| 1 | Nýtsla av gjaldføri § 25 minni nýtsla havnin | 1.500.000,00 |
| 2 | Lántøka | 1.300.000,00 |
| 1-2 | Samlað fígging eykajáttanin | 2.800.000,00 |

Ein eykajáttan sum henda førir eina útreiðslu við sær, sum hevur eina beinleiðis ávirkan á roknskap kommununar fyri 2016.

Tá ið talan er um eina eykajáttan, skal málið hava 2 viðgerðir í býráðnum við í minsta lagi 14 daga millumbili, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri við seinni broytingum, og við hvørja eykajáttan skal verða víst á, hvussu hon skal verða fíggjað.

Í hesum máli eins og øðrum verður víst btil § 31, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri við broytingum um nevndarformenn, at ehsir ansa eftir, at allar inntøkur og útreiðslur hava neyðuga játtan.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini og beina málið til 2. og endaliga viðgerð á býráðsfundi 17. mars 2016. (9-0).

**Mál nr. 15/2016.**

**Mál viðvíkjandi tilboði upp á flotbrúgvar til bátahavnina og eykajáttan.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið tilboð frá P/F Petur Larsen, dagfest 15. januar 2016 upp á nýggjar bátabrúgvar upp á kr. 3.634.000,00. Aftrat hesum kemur upphæddin, sum Høgni Kjeld kann gera fyri kr. 135.000,00.

Aftrat hesum kemur so burturbeining vm, so samlaði kostnaður kemur runt roknaður at verða umleið kr. 4,0 mió.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í vinnunevndini tann 12. februar 2016 og verður mælt til, at tikið verður av fyriliggjandi tilboði. Fyrivarni verður tikið fyri, at møguligar tillaðingar verða gjørdar av teknisku deild.

Vísandi til at einans kr. 2,0 mió eru avsettar á fíggjarætlanini fyri 2016 verður heitt á fíggjarnevndina um at útvega neyðuga restfígging.

Eisini verður mælt til, at innara síða av grótkastinum verður klødd við dekkgróti, áðrenn brúgvarnar verða lagdar út. Økið verður hampað, asfalterað og gøtuljós uppsett. Tekniska deild ger kostnaðarmeting av hesum.

Tekniska deildin hevur tann 16. februar 2016 sent fíggjarnevndini eina kostnaðarmeting í sambandi við viðurskiftunum, sum nevnd eru omanfyri, og verður talan um ein eykakostnað upp á kr. 780.000,00, og tá er el á bátabrúgvunum ikki við í metingini og ei heldur í tilboðnum.

Sostatt er talan um ein samlaðan kostnað upp á kr. 4,8 mió.

Fíggjarnevndin viðgjørdi málið á fundi tann 18. februar 2016 og staðfesti, at avsettar eru kr. 2,0 mió til íløgur í bátahavnina fyri fíggjarárið 2016. Sostatt resta kr. 2,8 mió í, um verkætlanin kann verða framd.

Nevndin mælir einmælt býaðnum til at veita eina eykajáttan upp á kr. 2,8 mió til íløgur í bátahavnina – Fuglafjarðar havn rakstrarstað 751 konto 3142-00, soleiðis at játtanin til íløguma verður hækkað úr kr. 2,0 mió upp í kr. 4,8 mió, hetta vísandi til § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri við seinni broytingum.

Vísandi til § 41, stk 2 í nevndu lóg verður eykajátanin upp á kr. 2,8 mió. fíggjað sambært niðanfyri standandi:

| | Játtantekstur | Rakstrarstað-konta | Upphædd: |
|---|---|---|---|
| 1 | Flutt frá rakstri havnin | 750-1652-00 | 600.000,00 |
| 2 | Lántøka | | 2.200.000,00 |
| | | | |
| 1-2 | **Samlað fígging eykajáttanin** | | 2.800.000,00 |

Ein eykajáttan sum henda førir eina útreiðslu við sær upp á kr. 2,2 mió, sum hevur eina beinleiðis ávirkan á roknskap kommununar fyri 2016.

Tá ið talan er um eina eykajáttan, skal málið hava 2 viðgerðir í býráðnum við í minsta lagi 14 daga millumbili, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri við seinni broytingum, og við hvørja eykajáttan skal verða víst á, hvussu henda skal verða fíggjað.

Í hesum máli, eins og í øðrum verður víst til § 31, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri við seinni broytingum um nevndarformenn, at hesir ansa eftir, at allar inntøkur og útreiðslur hava neyðuga játtan.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini og beina málið til 2. og endaliga viðgerð á býráðsfundi 17. mars 2016. (9-0). Meðam hetta mál varð viðgjørt og avgerð tikin vórðu Asbjørn Berthelsen og Jákup Frants Larsen ikki á fundi vegna ógjegni.

**<u>Mál nr. 16/2016.</u>**

**Mál viðvíkjandi umsókn frá Heildarverk um byggiloyvi vegna Landsverk.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá Heildarverk, dagfest 03. februar 2016 vegna Landsverk um byggiloyvi til Miðnám á matr. nr. 871cl á Kambsdali sambært hjálagdar tekningar.

Talan er um broytan av byggiloyvi, soleiðis at tann parturin, sum er innan fyri auluna verður broyttur solieðis, at bygt verður sambært fyriliggjandi umsókn.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 16. februar 2016, og mælir nevndin býráðnum til, at umsóknin verður gingin á møti.

**Avgerð:**
Tilmæli frá teknisku nevndini varð samtykt. (/9-0).

**<u>Mál nr. 17/2016.</u>**

**Mál viðvíkjandi gongugøtu á Hellunum.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá Jústinus Ejdesgaard um gongugøtuna millum Laksá og Marine Harewest á Hellunum, og har neyðugt loyvi frá Náttúrufriðingarmyndugleikunum fyriliggur.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 16. februar 2016, og mælir nevndin býráðnum til, at umsóknin verður gingin á møti, soleiðis at endalig staðseting verður gjørd í samráð við kommununa.

Játtanin er treytað av góðkenning frá Skarðhaga.

**Avgerð:**
Tilmæli frá teknisku nevndini varð samtykt. (/9-0).

**<u>Mál nr. 18/2016.</u>**

**Mál viðvíkjandi vatngoymslutunnlum á Heimaradali.**

Í sambandi við stóran tørv á vatngoymslum er arbeitt við at loysa hetta mál við at gera vatngoymslutunnlar á Heimaradali.

Tekniska deildin hevur kannað hetta mál og sambært tilboði frá Articon, dagfest 03. februar 2016 kemur kostnaðurin av eini slíkari at verða umleið 20 mió fyri eina goymslunøgd upp á 50.000 m3.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í vinnunevndini 12. februar 2016 og teknisku nevndini 16. februar 2016 og verður mett, at fíggjarligan umstøður eru ikki fyri at gera hetta arbeiðið nú.

Nvendirnar mæla tí býráðnum til, at neyðugt fyrireikingararbeiði verður gjørt, soleiðis at arbeiðið kann verða gjørt, tá ið umstøður annars eru til tað, so sum samráðingar við Gjógvarahaga, broyting/tillaging av byggisamtykt og góðkenning frá Náttúrufriðingarnevnd.

**Avgerð:**
Tilmælini frávinnunevndini og teknisku nevndini vórðu samtykt. (8-0). Meðan málið varð viðgjkørt nog avgerð tikin varð Asbjørn Berthelsen ikki á fundi vegna ógjegni.

**Mál nr. 19/2016.**

**Tilmæli til býráðið um FK bygningin.**

Ein arbeiðsbólkur hevur arbeitt við at viðgerða málið viðvíkjandi FK bygninginum.

Endamálið hjá arbeiðsbókinum var at koma við einum uppskoti til, hvat FK bygningurin kann rúma av hølum til teir sosialu fakbólkarnar umframt býráðsumsitingina.

**Í arbeiðsbólkinum vóru**: Dánjal Vang, býráðspolitikari og formaður í arbeiðsbólkinum. Árant Berjastein, býráðspolitikari. Petur Abrahamsen, býráðspolitikari. Marin S. Thomsen fíggjarleiðari. Pætur Joensen tekniskur leiðari og Irena Olsen sosialdeildarleiðari.
Irena Olsen samskipar fundirnar og er skrivari.

Fyrsti fundur um málið var tann 30. januar 2015 og seinasti fundur var tann 01. februar 2016. Íalt átta fundir í byggibólkinum. Fýra fundir hava eisini verið við teir sosialu tænastubólkarnar, barnaverndartænastuna, læknaskrivara, heilsufrøðingar, jarðamóðir, umframt ein vitjan í Sørvágs tannlæknastovu sum er knýtt at skúlanum í Sørvági.

Byggibólkurin hevur tekningar frá teknistovuni í Gøtu, sum eru viðlagdar tilmælinum.

Endaliga uppskotið er at FK bygningurin verður brúktur til kommunala umsiting, sum nú er blivin størri tað seinasta árið og tí krevur meira pláss enn tá arbeiðsbólkurin byrjaði.

Fuglafjarðar kommuna hevur leigumál við tannlæknastovuna hjá Steintór Larsen og arbeiðast skal skjótt við at gera nýggj tannlækahølir í miðhæddini í FK bygninginum.

Heilsufrøðingarnir við mammubólkum og jarðamóðir verða eisini í miðhæddini. Síðani eru hølir har pláss er fyri øðrum starvsbólkum hjá kommununi. Hølir eru tøk til láns, til eitt hvørt endamál, sum til fundir, skeið og fyrilestrar.

Um tannlæknastova ikki skal verða í FK bygninginum, sum tekningin vísir so eru aðrir møguleikar í miðhæddini. Ein møguligur býráðssalur.

Sum nú er, brúka "mennirnir úti á vegnum" niðastu hædd í FK bygninginum.

**Tilmælið til býráðið:**
Byggibólkurin hevur tikið avgerð um at beina málið til býráðið til støðutakan. Byggibólkurin metir seg vera lidnan við arbeiðið við tí endamáli, bólkurin var settur til frá byrjan at koma við uppskotið "Til umsiting og sosialar tænastur í FK bygninginum".

Arbeiðsbólkurin mælir til at pengar verða settir av til at umvæla FK bygningin til kommunala umsiting, til eina møguliga tannlæknastovu, til mammubólkar og onnur endamál hjá kommununi.

**Avgerð:**
Tilmæli frá byggibólkinum fall. 4 atkv. fyri og 5 atkv. ímóti. Fyri atkvøddu Sonni á Horni, Sigga Óladóttir Joensen, Petur Abrahamsen og Asbjørn Berthelsen. Ímóti atkvøddu Sigurð S. Simonsen, Eyðun á Lakjuni, Magnus S. Midjord, Dánjal Vang og Birgir Petersen.

**Mál nr. 20/2016.**

**Mál viðvíkjandi vali av politiskum fylgibólki til bygging av barnaskúla.**

Á fundi í mentamálanevndini tann 16. februar 2016 legði nevndarformaðurin fram uppskot um at seta ein politiskan fylgibólk í sambandi við bygging av barnaskúla. Hann vísti á, at umstøður viðvíkjandi bygging av barnaskúla kunnu hava við sær politiskar avgerðir, har tørvur verður á at mýkja og tryggja, at avgerðir fáa undirtøku.

Sostatt varð lagt fram at seta ein fylgibólk við 4 politiskum umboðum, sum bygginevndin kunnar mánaðarliga.

Mentamálanevndin tekur undir við uppskotinum, eins og borgarstjórin leggur áherðslu á, at bygginevndin skal hava fríar rammur at virka undir og álit frá býráðnum.

**Avgerð:**
Samtykt varð at velja hesar býðslimir í politiska fylgibólkin: Magnus S. Midjord, Birgir Petersen, Sonna á Horni og Siggu Óladóttir Joensen. (9-0). Somuleiðis varð avgerð tikin um at avtaka skúlabygginevndina, sum vald varð av býráðnum tann 12. november 2012 í sambandi við skipan við seinni broytingum. (9-0).

**<u>Mál nr. 21/2016.</u>**

**Mál viðvíkjandi tekning av nýggjum barnaskúla.**

Á fundi í mentamálanevndini tann 16. februar 2016 legði nevndarformaðurin fram uppskot um velja MAP arkitektar at tekna nýggja barnaskúlan.

MAP arkitektar hava nógvar royndir við skúlabyggingum og hartil hevur Rúni Abrahamsen innlit og vitan sum ráðgevi hjá bygginevndini.

Nevndin mælir býráðnum til at taka undir við uppskotinum um at velja MAP arkitektar til at tekna nýggja barnaskúlan.

**Avgerð:**
Tilmæli frá mentamálanevndini varð samtykt. (9-0).

**<u>Mál nr. 22/2016.</u>**

**Skriv frá Dánjal Vang um nevndarsessin í skúlabygginevndini.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá Dánjali Vang, dagfest 18. januar 2016, har hann sigur nevndarsessin frá sær í skúlabygginevndini. Sigurð S. Simonsen fór úr hesum nevndarsessi tann 12. november 2015, so hann kundi koma í henda.

Tí mælir hann til, at Sigurð S. Simonsen verður valdur inn aftur í henda sess.

Avgerð á býráðsfundi 28. januar 2016:
Eftir áheitan frá Dánjali Vang varð samtykt at taka máli av skránni og útsett til viðgerð á komandi býráðsfundi 25. februar 2016. (9-0).

**Avgerð:**
Málið kom ikki til viðgerðar, við tað at skúlabygginevndin er avtikin av býráðnum, sí mál nr. 20/2016.

**<u>Mál nr. 23/2016.</u>**

**Skriv frá Dánjali Vang um formansstarvið í gamla Fk bygninginum.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá Dánjali Vang, dagfest 18. januar 2016, har hann sigur formansstarvið frá sær í ”Gamla FK handlinum”, tí uppgávan, sum hann fekk av býráðnum er lokin.

Tekningar eru fingnar til vega, so býráðið má taka støðu til, hvussu víðari skal fara fram. Men ivasamt er, um tekningarnar vísa, um hetta er rætti vegurin at ganga.

Sum støðan er í løtuni hevur býráðið einki álit fingið frá bólkinum til at taka støðu út frá, og tí má metast fyrisitingarliga, at arbeiðið ikki er lokið hjá bólkinum.

**Avgerð á býráðsfundi 28. januar 2016:**
Eftir áheitan frá Dánjali Vang varð samtykt at taka máli av skránni og útsett til viðgerð á komandi býráðsfundi 25. februar 2016, tá ið málið um FK bygningin verður lagt fyri býráðið. (9-0).

**Avgerð:**
Málið kom ikki til viðgerðar, við tað at arbeiðið hjá byggibólkinum er lokið, og avgerð tikin av býráðnum, sí mál nr. 19/2016.

**<u>Mál nr. 24/2016.</u>**

**Mál viðvíkjandi "Barnalund".**

Fyri at bøta um trygdina, tá ið børn skulu í og úr Barnalund, so hevur tekniska nevndin viðgjørt málið á fundi 16. februar 2016.

Nevndin mælir býráðnum til, at partur av blomsturbedinum framman fyri bygninginum verður gjørdur til gongugøtu, soleiðis at børnini kunnu ganga til inngongdina uttan at koma út á ítróttarbrekkuna.

**Avgerð:**
Tilmæli frá teknisku nevndini varð samtykt. (9-0).

**<u>Mál nr. 25/2016.</u>**

**Mál viðvíkjandi "Ítróttarbrekkuni".**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá Trygdarbólkinum, har heitt verður á kommununa um av trygdarávum um at steingja ítróttarbrekkuna fyri allari gjøgnumgangandi bilferðslu.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 16. februar 2016, og mælir nevndin býráðnum til, at bummur verður settur í ovara enda á ítróttarbrekkuni, soleiðis at gøtan verður stongd í sambandi við hálku. Hetta er grundað á, at tørvur er á tveimum atkomumøguleikum.

**Avgerð:**
Broytingaruppskot frá borgarstjóranum um at taka undir við tilmælinum frá Trivnaðarbólkinum fall. 4 atkv. fyri og 5 atkv. ímóti. Fyri atkvøddu Sonni á Horni, Sigga Óladóttir Joensen, Petur Abrahamsen og Asbjørn Berthelsen. Ímóti atkvøddu Sigurð S. Simonsen, Eyðun á Lakjuni, Dánjal Vang, Magnus S. Midjord og Birgir Petersen.

Tilmæli frá teknisku nevndini varð samtykt. (8-0). Blankt atkvøddi Sonni á Horni.

**<u>Mál nr. 26/2016.</u>**

**Mál viðvíkjandi uppskoti til nýggja kommunuvallóg.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá Heilsu- og Innlendismálaráðnum, dagfest 03. februar 2016 um almenna hoyring av uppskoti til løgtingslóg um val til kommunur. Endamálið við uppskotinum er, at tað er tørvur á at:

- Dagføra kommunuvallógina.
- Áseta minstakravið til støðd á valstøðum 100 veljarar.
- Víðka rættin til at atkvøða við brævi.
- Veljari á útoyggj rætt til at brævatkvøða á oynni.
- Rætturin hjá veljara, ið tørvar hjálp, sjálvur at útnevna annan hjálpara.
- Heimila kommununum at nýta teldutøkar vallistar.
- Áseta sama uppgerðarhátt sum í løgtingsvallógini (hátturin við størsta brøki).

Hoyringsfreistin er sett til 04. mars 2016. Annars hevur almennur hoyringsfundur verið í Hielsumálaráðnum tann 17. februar 2016 og hava kommunal star4vsfólk og kommunuvalnevndin luttikið á hesum fundi.

Kommunuvalnevndin boðar í telduposti, dagfestum 18. februar 2016 kommununi frá, at nevndin ongar viðmerkingar hevur til uppskotið um nýggja kommunuvallóg, sum ætlan er at seta í gildi, og sum fyrstu ferð verður nýtt í sambandi við kommunuvalið 08. november 2016.

Uppskotið er sent Kommunufelagnum  og øllum kommununum til viðmerkingar. Mállið hevur verið til viðgerðar á stýrisfundi í kommunufelagnum tann 19. februar 2016, har høvuðsbroytingarnar vórðu gjøgnumgingnar og tikið varð samanum viðmerkingar, sum komu fram á hoyringsfundinum 17. februar.
Avgerð tikin um eftir tilmæli frá starvsbólkinum, at eitt felagsskriv kemur frá felagnum, og at kommunurnar senda felagnum møguligar viðmerkingar.

Hetta forðar tó ikki kommununum at senda egið hoyriungsskriv.

**Avgerð:**

Samtykt varð, at nevndin bert hevði smávegis viðmerkingar til lógaruppskotið, sum verða sendar Kommunufelagnum, sum kemur at senda Heilsu- og Innlendismálaráðnum svarskriv til hoyringsskrivið áðrenn 04. mars 2016. (9-0).

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 22.10.

Magnus S. Midjord

Sigga Óladóttir Joensen

Dánjal Vang

Eyðun á Lakjuni

Petur Abrahamsen

Sigurð S. Simonsen

Asbjørn Berthelsen

Birgir Petersen

Sonni á Horni

Skrivari:

Jákup Frants Larsen